# Broyttir takstir

IRF

## Takstir fyri burturkast at brenna

Burturkast at brenna, ella brenniburturkast,  er smátt leyst burturkast, sum ikki kann endurnýtast, ikki kann ella skal tyrvast ella ikki er serliga dálkandi ella vandamikið.

Takstir eru fyri innsavning við útgerð, IRF hevur góðkent, fyri móttøku og viðgerð. Er tilfarið samantrýst, verður prísurin faldaður við 3. Kann tilfarið ikki brennast, verður tað burturbeint á annan hátt fyri eykakostnað. Allir takstir eru uttan mvg.

| Tilfar | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Smátt brenniburturkast** | $m^3$ | Kr. 200,00 | Smátt leyst burturkast stytri enn 0,5 metur hvønn vegin, sum ikki kann endurnýtast, ikki kann ella skal tyrvast ella ikki er serliga dálkandi ella vandamikið.<br><br>Gráur virkisposi kr. 30 fyri hvønn. |

| Tilfar | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Stórtimbur at brenna** | $m^3$ | Kr. 270,00 | Stórtimbur er  trivaligir timburstokkar longri enn 0,5 metrar, og plátur, plattar, borð og tílíkt, sum eru meira enn 0,5 metrar hvønn vegin. Stórtimbur skal latast inn á Endurnýtsluplássið á Gjánoyri. |

| Tilfar | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Vátt lívrunnið burturkast** | $m^3$ | Kr. 800,00 | Vátt lívrunnið burturkast frá alivinnu, fiskivinnu og landbúnaði, so sum deyður fiskur, tilfar úr reinsibrunnum, innvølur av seyði og deyð djór.<br><br>Tað er umráðandi, at vátt lívrunnið burturkast er  so væl avvatnað sum gjørligt, áðrenn tað kemur til Brennistøðina.<br><br>Neyt og ross skulu vera sundurbýtt í minst fýra javnt stórar partar, umframt innvøl, áðrenn tey koma á Brennistøðina. |

| Tilfar | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Trolleivdir í plastsekkjum** | $m^3$ | Kr. 600,00 | Væl sundurkutað net úr polyethylen, uttan grunn, flot , koyrt í sekkir upp til 250 litrar,  verður brent. |
| **Ymiskt háorkuburturkast** | $m^3$ | Kr. 600,00 | Sera skitin nylongørn uttan grunn er eitt dømi. Netini skulu vera í posum, upp til 240 litrar. |

# Broyttir takstir

IRF

| Fráskiljing | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Fráskiljing av tilfari, sum ikki skal brennast** | $m^3$ | Kr. 400,00 | Ómaksgjald verður tikið fyri fráskiljing av óviðkomandi tilfari. Gjaldið verður lagt oman á galdandi eindarkostnað. |

| Sundurkuting | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Sundurkuting av ov stórum lutum** | $m^3$ | Kr. 400.00 | Trivaligir timburstokkar skulu ikki vera longri enn 0,5 metrar.<br><br>Plátur, plattar, borð og tílíkt skulu ikki vera meira enn 0,5 metrar hvønn vegin.<br><br>Ómaksgjald verður tikið fyri sundurkuting av ov stórum lutum sum koma beinleiðis á Brennistøðina. Gjaldið verður lagt oman á galdandi eindarkostnað. |

# Broyttir takstir

IRF

## Takstir fyri burturkast at endurvinna

Burturkast at endurvinna, er burturkast, sum ikki skal brennast ella tyrvast, og sum ikki er serliga dálkandi ella vandamikið. Prísirnir eru fyri leyst tilfar innsavnað við útgerð, IRF hevur góðkent, og fyri móttøku og viðgerð.

Er tilfarið samantrýst, verður prísurin faldaður við 3. Avtala kann gerast um kostna fyri móttøku av pappi og pappíri uttan innsavning, minstamark 4 $m^3$. Hvítur virkisposi kostar kr. 15,00. Kann tilfarið ikki endurnýtast, verður tað burturbeint á annan hátt fyri eykakostnað. Allir takstir eru uttan mvg.

| Tilfar | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Papp, væl skilt** | $m^3$ | Kr. 50,00 | Papp er t.d. væl skidar pappeskjur, bylgjupapp og stuðulspapp, sum er rímuliga reint og ikki klætt við plasti, voksi ella aluminiumsfoliu. |
| **Pappír, væl skilt** | $m^3$ | Kr. 50,00 | Pappír er t.d. brævbjálvar, dagbløð, innballingarpappír, kopipappír, lýsingarbløð, makulerað pappír, papprullur, skrivipappír, smápakningur, tíðarrit, vikubløð. |
| **Pappír og papp, blandað** | $m^3$ | Kr. 120,00 | Samanblanding av pappíri og pappi |

| Tilfar | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Glærplast** | $m^3$ | Kr. 0,00 | Glærplast er litleyst plast, sum t.d. verður brúkt til at vinda um eskjur á plattum. Glærplast verður koyrt í gjøgnum-skygdar plastposar, sum sum verða heintaðir samstundis, sum papp verður heintað.. |
| **Litplast** | $m^3$ | Kr. 50,00 | Litplast er hvítt plast ella plast í ljósum gulum, reyðum, grønum ella bláum litum.<br><br>Litplastið skal vera í gjøgnumskygdum virkisposa frá IRF ella sum samantrýst byrði. Litplastið verður heintað samstundis sum papp. |
| **Garnaleivdir úr nylon** | $m^3$ | Kr. 85,00 | Prísurin er fyri net uttan endar, flot, blýlínur, veirar o.t. Kann tilfarið ikki endurnýtast, verður tað burturbeint á annan hátt fyri eykakostnað. |
| **Stórsekkir úr polyethylen** | $m^3$ | Kr. 25,00 | Prísurin er fyri reinar og turrar sekkir uttan fóðurleivdir ella aðrar leivdir. |

# Broyttir takstir

IRF

| Tilfar | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Jarn og metal** | $m^3$ | -Kr. 60,00 (IRF letur 60 kr/$m^3$) | Jarn og metal er t.d. aluminium og úrdráttir úr tí, hvítvørur, undantikð køli- og frystiútgerð, Jarn og úrdráttir úr tí, maskinur og maskinlutir, onnur metal og metallutir, tangar og bingjur, ymiskt blandað metalskambul. |
| **Elektronikkur** | kg | Kr. 4,20 | Borimaskinur við battaríum at løða, kopimaskinur, kaðalleivdir, leikur við battaríum at løða, lummateldur, prentarar, sjónbandaspælarar, sjónvørp, teldur, tól við battaríum at løða, tónleikaskipanir, útvørp |

| Tilfar | Eind | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **Fráskiljing av tilfari** | $m^3$ | Kr. 400,00 | Ómaksgjald verður tikið fyri fráskiljing av óviðkomandi tilfari og av ov stórum lutum. Gjaldið verður lagt oman á galdandi eindarkostnað. |
| **Sundurkuting av ov stórum lutum** | $m^3$ | Kr. 400,00 | Ómaksgjald verður tikið fyri sundurkuting av ov stórum lutum. Gjaldið verður lagt oman á galdandi eindarkostnað. |